# Vil koyra 10 tinglimir úr løgtinginum

**TINGLIMIR** Løgmaður heldur, at tað er ov nógv at hava 33 limir í løgtinginum og nú mælir til, at talið á løgtingslimum verður munandi skert

Áki Bertholdsen

– At Føroya Løgting skal vera mannað við 33 tinglimum, er alt ov nógv.

Tað heldur Kaj Leo Johannesen, løgmaður.

Og nú ein nógv umrødd nevnd er sett at endurskoða okkara valskipan, mælir hann til, at hon í hesum sambandi eisini tekur spurningin upp um, hvussu nógvir limir skulu vera í Løgtinginum.

Í Sosialinum mánadagin reisti Kári P. Højgaard, løgtingsmaður spurningin um, at allir politikarar skulu fara 55 ella 10% niður í løn fyri at vísa Føroya Fólki, at teir eru sinnaðir at ganga á odda, nú teir annars áleggja borgarunum eina byrðu og aðra fyri í eini roynd at basa kreppuni.

### 10 løgtingsfólk færri

Hetta er eitt uppskot, sum Kaj Leo Johannesen, heldur lítið um, sigur hann í aðrari grein her á síðuni.

Sjálvur heldur hann, at tað er nógv skilabetri at talið á løgtingslimum verður munandi skert.

Hann vísir á, at tað eru eisini onnur, sum hava reist spurningin um ikki tað eru ov nógvir tinglimir í Løgtinginum

**» Er tað neyðugt at hava 33 tinglimir at stjórna Føroyum?**

– Álvaratos altso, er tað neyðugt at hava 33 tinglimir at stýra Føroyum, spyr hann.

Sjálvur heldur hann, at eitt tingmannatal upp á 23 er hóskandi fyri eitt samfelag sum tað føroyska.

– Skulu vit tosa um at spara, vildi eg persónliga nógv heldur viðgjørt spurningin um at lækka tingmannatalið enn eg eri sinnaður at viðgera spurningin um at lækka lønirnar, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann heldur, at ein kombinatión kundi verið at lækka tingmannatalið, men at styrkt umsitingina í Løgtinginum so at hon fekk betri umstøður at virka og at gjøgnumkanna uppskot, sum verða løgd fyri tingið.

*aki@sosialurin.fo*



**FÆRRI TINGLIMIR**

*Kaj Leo Johannesen, løgmaður heldur, at 23 løgtingslimir eru nóg mikið til at stjórna Føroyum og tí mælir hann til, at talið verður lækkað*

**» Tað fyrsta, vit kunnu krevja av politikarum, er, at teir eru til arbeiðis**

# Uppskot um lønirlækking fekk løgmann at smílast

**POLITIKARALØNIR** Løgmaður heldur, at ongin álvari er í tankanum hjá Kára P. Højgaard, løgtingsmanni, um, at politikarar skulu niður í løn

Áki Bertholdsen

– Eg má viðganga, at eg smíltust fyri meg sjálvan, tá ið eg á Rás2 og í Sosialinum fekk at vita, at Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, heldur, at politikarar eiga at lækka sína egnu løn 5%-10%.

Kaj Leo Johannesen sigur, at hann kann ikki taka eitt slíkt uppskot frá sjálvstýris-formanninum í álvara.

Kári P. Højgaard heldur, at politikarar eiga at lækka sína egnu løn fyri at ganga undan sum góðar fyrimyndir, nú byrðar skulu leggjast á allar landsins borgarar fyri at koma okkum burtur úr kreppuni.

– Tað er í fínasta lagi at vit kunnu senda eitt signalvirði, sigur løgmaður.

Sjálvur róði hann í heyst framundir, at allar almennar lønir og sostatt eisini politikaralønirnar, skuldu standa í stað.

– Men tað varð ikki væl dámt, minnist hann og úrslitið varð eisini, at fakfeløgini hildu fast um lønarhækkingina, tey høvdu krav upp á eftir sáttmálanum.

– Men hatta uppskotið hjá Kára P. Højgaard um at politikarar nú skulu lækka í løn, ber eitt sindur brá av at verða sett fram fyri at tekkjast veljarunum.

### Skulu arbeiða fyri lønina

Hann heldur, at áðrenn politikarar fara at tala fyri lønarlækkingum, eiga teir at seta teir sjálvum ta krav, at teir arbeiða fyri ta løn, teir fáa.

Løgmaður staðfestir, at tað eru fleiri løgtingsfólk, sum taka sítt politiska starv í fullum álvara og sum tískil eru løgtingslimir burturav.

– Men tað eru sanniliga eisini løgtingslimir, sum hava hjástørv av øllum handa slagi. Og í hesum sambandi heldur hann, at tinglimirnir hjá Sjálvstýrisflokkinum halda seg sanniliga ikki aftur, tí báðir hava hjástørv og hjávinnur, sum teir røkja afturat sínum løgtingssessi.

– Tað fyrsta, vit kunnu vænta av løgtingslimum er, at teir eru til arbeiðis fyri sína løn og geva alla okkara orku til tað politisku arbeiði og ikki hava hjástørv og hjávinnur afturat.

– Tá ið løgtingslimir hava fingið síni viðurskifti í rættlag í so máta, kunnu teir eisini fara at seta høg krøv til aðrar politikarar, men ikki fyrr, leggur Løgmaður afturat.

Fyri nøkrum árum síðani samtykti Løgtingið at hækka sínar egnu lønir rættiliga munandi.

Grundgevingin fyri tí var, at varð lønin hækkað, kundi løgtingslimir verða politikarar burturav og tað skuldi føra til, at dygdin í lóggávuarbeiðnum fór at hækka.

Men tey eru mong, sum vilja tvíðhalda um, at tað hevur ikki gjørt mun.

Og heldur ikki løgmaður dugir at síggja tær stóru broytingarnar, tí enn eru tað nógv tingfólk, sum hava onnur størv afturat sínum løgtingssessi.

*aki@sosialurin.fo*